

Tummas Justinussen og Jens Meinhard Rasmussen kunnu vera ernir saman við øllum starvsfólkunum í fyritøkuni. Mynd Jan Müller

# Føroysk olju- og frálandavinna í miðdeplinum: Skansi og PAM heiðrað

Deil:

Jan Müller

26.09.2014 - 17:55

Oljan.fo

Skansi Offshore Service ársins virki

Tað sær ikki mætari út enn, at olju- og frálandavinnan er ovast á breddanum í Norðurlandahúsinum á ársins vinnudegi, tí fyri løtu síðani varð kunngjørt, at frálandareiðaríið "Skansi Offshore Service" hevur vunnið heiðurin at gerast Ársins virki 2014.

Hetta hendir stutt eftir, at eitt annað virki, sum arbeiðir sera nógv í somu bransju, MEST og PAM Offshore, fingu heiðurin "Ársins Átak". Við hesum verður víst til stórhendingina, tá boripallurin West Hercules kom inn á Skálafjørðin at vera umvældur. Hesi virkini hava høvuðsleiklutin í hesi stóru og fyri Føroyar týðandi hending.

Áhugavert er at merkja sær, at hóast eingin olja varð funnið á landgrunninum á hesum sinni, so eru tað kortini føroyskar vinnufyritøkur í olju- og frálandavinnuni, sum standa í fremstu røð, tá vinnan í Føroyum skal vigast.

Eingin ivi er um, at eitt felag sum Statoil eisini kennir seg at eiga lut í hesum heiðurslønum, nú felagið hevur verið við til at fáa West Hercules til lands at verða umvældan, áðrenn hann fer víðari til Kanada at bora fyri Statoil.

Felagið hevur so eisini ein týðandi leiklut í føroysku luttøkuni í sambandi við boringarnar í ár, har Skansi fekk ein av sáttmálunum, nevniliga við Sjóborg sum veitingarskip.

Myndirnar eru frá heiðurslønarhandini í dag. Myndatøka Jan Müller